Havnar leksikon:

# Kongaminni á Gripsheyggi



Í 1882 varð Kongaminni á Gripsheyggi í Havn reist til minnis um fyrstu kongavitjanina, tá Chr. tann 9 vitjaði oyggjarnar í 1874. Danin H.C. Amberg teknaði Kongaminni og Jákup Andr. Arge (Jampan) bygdi tað.

Innsettu myndirnar: Jákup Andr. Arge (1854-1931) og modellið av Kongaminninum sum hann gjørdi, og sendi tað niður til Amalienborg, har tað stendur enn í dag.

*Myndir: Føroya Fornminnissavn*

# Springvatnið á Vaglinum



Springvatnið á Vaglinum varð gjørt í samband við at Kong Chr. 10 var á vitjan í Havn í 1936. Fyrstu ferð springvatnið bleiv brúkt alment, var árið eftir á Ólavsøku í 1937. Hetta sama áríð vóru fyri fyrstu ferð settar ljósperur upp millum trøini framvið Havnará. Springvatnið bleiv tikið burtur, tá arbeiðið við at dekka ánna til byrjaði í 1957.

*Mynd: Inger Hansen*

**Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168**